TÍÐINDI

OV LÍTIÐ YVIRSKOT Á FÍGGJARLÓGINI Í ÁR

Í várfrágreiðingini finst Búskaparráðið at, at avlopið í fíggjarlógini fyri 2020 er alt ov lítið, nú tíðirnar eru so góðar



Árni Gregersen

142 milljónir krónur í avlopið er alt ov lítið, nú tíðirnar eru so góðar og arbeiði er til allar hendur.

Tað sigur Búskaparráðið í várfrágreiðingini, sum júst er l'gd fram. Búskaparráðið skal leggja sína várfrágreiðing fram 1. marts.

-Við verandi konjunkturstøðu, við metlágum arbeiðsloysi átti yvirskotið á fíggjarlógini tí at verið væl størri fyri 2020, sigur ráðið.

Umframt at arbeiði er til allar hendur, so er vøksturin metstórur og búskaparligi vøkstyurin er munandi størri enn ráðið upprunaliga hevði mett at hann fór at vera fyri 2019.

Fyri einum ári var mett, at vøksturin í búskapinum fór at vera nakað yvir trý prosent. Seinni var mett at hann fór at verða góð seks prosent, men nú várfrágreiðingin er komin, vísir tað seg, at vøksturin í fjør í leypandi prísum fer at vera níggju prosent.

-Tað er serliga útflutningurin av aldum laksi, sum ávirkar hetta talið. Nýggir mátar at ala uppá, har fiskurin verður aldur á landi til hann er yvir 500 gra, til støddar, tá ið hann verður settur á sjógv, ger at hann veksur skjótari og fellið er munandi minni, sigur Djóni Højgaard, formaður í Búskaparráðnum.

Ov lítil nettoogn

Nettoogn landskassans er í 2020 mett til eina slaka hálva milljard í minus.

Tá mált verður eftir nettofíggjarogn uttan útbúnað hevur landskassin í krónum eina verri fíggjarstøðu í 2020 enn í 2007. Hetta er ein avbjóðing fyri førleika landskassans at halda eina støðuga útreiðslugongd í einum komandi lágkonjunkturi.

Fíggjarogn landskassans skal annaðhvørt vera so stór, at hallini kunnu berast uttan lántøku, ella skal fíggjarstøðan vera so mikið góð, at kredittvirðið er nóg gott til at læna til hallini í einum lágkonjunkturi.

Í tíðarskeiðinum 2008 til 2015 økti landsstýrið skuldina við samanlagt 2,7 mia. kr.

Í hesi tilgongd lækkaði metingarfyritøkan Moody's kredittmetingina. Hetta merkir, at tað ikki var nógmikið, at nettoognin hjá landskassanum var null í 2007, beint undan fíggjarkreppuni í 2008, fyri at megna tey komandi árini við halli uttan at missa eitt stig í kredittmetingini.

Við verandi konjunkturstøðu, við metlágum arbeiðsloysi átti yvirskotið á fíggjarlógini tí at verið væl størri fyri 2020, sigur Búskaparráðið.

Nógv viðrákl

Gongdin í føroyska búskapinum seinastu árini hevur verið serlig vegna óvanliga nógv viðrák viðvíkjandi oljuprísum, uppsjóvar-, botnfiska- og laksaprísum.

Í 2019 vaks útflutningurin aftur, eftir at lítið fall hevði verið í útflutninginum í 2018.

Tøkan í alivinnuni vísti seg at vera økt upp aftur meira enn áður mett í 2019 í mun til árið fyri. Hetta er ein av høvuðsorsøkunum til, at vøksturin í BTÚ fyri árið 2019 er hægri, enn hvat mett var á heysti 2019.

Aðrar orsøkir til økta vøksturin í BTÚ eru millum annað at meira var útflutt av makreli og sild enn áður mett, umframt at øktar nøgdir av útfluttum toski og hýsu hava givið eitt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2019.

Sama nøgd av laksi væntast at verða útflutt í 2020 sum í 2019, og laksaprísurin væntast at vera støðugur í ár.

Størri makrelkvota og økt veiða av botnfiskasløgunum undir Føroyum saman við uppgangandi prísum á botnfiski, er við til at dríva vøksturin í BTÚ í 2020.

Harafturat geva almenna og privata nýtslan positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í ár.

Búskaparráðið hevur sum nevnt saman við Hagstovuni endurmett vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fyri 2019.

Búskaparráðið metir vøksturin í 2019 at vera níggju prosent og í 2020 at verða sjey prosent.

UPPGERÐ Í LEYPANDI PRÍSUM

Í Føroyum gera vit bert BTÚ upp í leypandi prísum. Hetta merkir, at vit í Føroyum ikki kenna reala búskaparvøksturin, sum er árligi vøksturin í BTÚ í føstum prísum.

Útrokningin í føstum prísum vísir reala búskaparvøksturin. Hesin gevur ábendingar um produktivitetsvøksturin í búskapinum.

Vit noyðast tí at halda okkum til BTÚ í leypandi prísum, tá vit skulu meta um framtíðar búskapargongdina í tí stutta siktinum. At meta um framtíðar gongdina í BTÚ í leypandi prísum er truplari enn at meta um BTÚ-gongdina í føstum prísum.

Harumframt hevur talið fyri vøksturin í BTÚ í leypandi prísum eitt avmarkað nýtsluvirði. Prísgongdir í uttanlandshandlinum (innflutningi og útflutningi) hava seinnu árini stórliga ávirkað uppgjørda BTÚ-ið í leypandi prísum.

Lutføll millum ymiskt tilfar og framleiðslu í vinnugreinum eru meira støðug í føstum prísum. Tí eru nakrir samanhangir lættari at halda skil á í føstum prísum.

Føroyski búskapurin sveiggjar nógv, tað er tí lættari at gera metingar við tjóðarroknskapinum í føstum prísum. At gera metingar av framtíðar prísgongdum í millum annað uttanlandshandlinum er sera trupult, og hetta ger eisini metingina av BTÚ-vøkstrinum í leypandi prísum meira óvissa.

Ein uppgerð av BTÚ-vøkstrinum í føstum prísum hevði gjørt tað møguligt at mett um trendin í búskapargongdini í langa siktinum og sveiggini rundan um hendan trend í stutta siktinum. Ein slík uppgerð hevði eisini minkað um óvissuna í metingunum, tí vit tá kundu sæð burtur frá prísbroytingum í m.a. uttanlandshandlinum.